SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Børn niður í trý ára aldur eru deyð av sudansku bumbunum*

*ES-umboðsmaðurin í Darfur*

# Hevði fleiri møguleikar at rýma




*Eysturríkska løgreglan heldur, at Natascha Kampusch hevði fleiri møguleikar at flýggja*
*Mynd: Reuters*

**Løgreglan í Eysturríki sigur, at Natascha Kampusch hevði fleiri møguleikar at rýma frá burturflytaranum ella at gera vart við seg**

Á løgreglustøðini í Wien undrast tey á, hví tann burturflutta gentan ikki rýmdi fyrr enn í summar, tí hon hevði eftir øllum at døma fleiri møguleikar at rýma ella at siga øðrum frá støðu síni.

Eitt nú er løgreglan komin eftir, at burturflytarin, Wolfgang Priklopil, plagdi at eta á einari matstovu, og at Natascha sat eftir í bilinum uttan fyri og bíðaði. Tað er hugsandi, at bilurin var soleiðis háttaður, at hon slapp ikki úr honum, men hví varskógvaði hon ikki tey, sum gingu fram við bilinum, spyr løgreglan.

Tað er eisini komið fram, at tey bæði vórðu fleiri ferðir steðgað, tá løgreglan hevði ferðslukanningar, men hví segði Natascha einki við løgreglumenninar?

Kanningarnar hava eisini avdúkað, at Wolfgang Priklopil og Natascha Kampusch hildu vetrarfrí í einum av teimum væl umtóktu skíðplássunum í Eysturríki stutt eftir nýggjár í ár. Men heldur ikki har gjørdi gentan vart við seg, sigur løgreglan.

Ein talsmaður hjá eysturríksku løgregluni ásannar í samrøðu við týska blaðið Die Welt, at viðurskiftini millum Wolfgang Priklopil og Nataschu Kampusch tykjast rættiliga fløkt.

# Bumba sivilfólk í Darfur

**Sudanska flogvápnið bumbar sivilfólk í landspartinum Darfur**

– Flogvápnið bumbar bygdir við sivilfólki í einari roynd at revsa uppreistrarmenninar. Eg sá, at flogfør av Antonov-slagnum blivu gjørd klár til álop, sigur finski ES-umboðsmaðurin í Darfur, Pekka Haavisto, við tíðindastovuna Reuters. Hann sigur seg hava fingið at vita, at børn niður í trý ára aldur hava latið lív í loftálopunum.

ST-aðalskrivarin, Kofi Annan, legði fyrr í vikuni sudansku stjórnina undir at fara alt ov harðliga fram. Stjórnin sigur, at hon hevur sent hermenn til Darfur at tryggja friðin, nú hermenninir hjá Afrikanska Eindarfelagsskapinum eru farnir haðani, men sambært Kofi Annan hava teir sudansku stjórnarhermenninir ikki tryggjað friðin. Tvørturímóti.

Trygdarráðið hjá ST hevur samtykt at senda 20.000 hermenn til Darfur, men sudanska stjórnin sigur, at hon fer at senda stjórnarherin eftir ST-hermonnunum, koma teir hagar. USA hevur hótt við at seta hart ímóti hørðum, men higartil hevur sudanska stjórnin ikki latið hóttanina við seg koma.

Sudansku álopini í seinastuni hava sambært FAO havt við sær, at tey svøltandi í Darfur fáa ikki mat longur. Tað gjørdi millum annað, at í august fingu 350.000 fólk onga neyðhjálp.

## STUTT SAGT

### Kristin sekt uppi í politikki

Í Svøríki hevur sektin Plymouth-brøðurnir gjørt av at styðja teir borgarligu flokkarnar upp undir ríkisdagsvalið, sum verður um vikuskiftið.

Sambært Aftonbladet hevur eitt felag, sum eitur Nordas Sverige, brúkt fleiri milliónir krónur til blaðlýsingar og flogseðlar, sum eggja fólki til at virka fyri einum politiskum skifti í Svøríki. Í lýsingunum fær tann sosialdemokratiska stjórnin skyldina av veksandi harðskapi í svenska samfelagnum, og at fleiri sviar doyggja av vanrøkt.

Aftonbladet skrivar, at Nordas Sverige hevur tætt tilknýti til ta kristnu sektina, og leiðslan í sektini vil ikki gera viðmerkingar til, hví hon brúkar nógvar pengar til eitt politiskt valstríð. Leiðslurnar í teimum borgarligu flokkunum avsanna, at flokkarnir hava nakað samband við Plymouth-brøðurnar, sum Aftonbladet lýsir sum eina konservativa og vídgongda samkomu.

### Fidel komin fyri seg

Gamli kubanski forsetin, Fidel Castro, er nú komin so mikið fyri seg eftir magaskurðviðgerðina í juli, at hann hevur fingið sær eina telefon inn á sjúkrastovuna, so hann kann geva tey boð, sum hann heldur vera neyðug. Tað skrivar almenna blaðið Gramma.

Blaðið veit eisini at siga, at forsetarnir í Venesuela og Bolivia, Hugo Chavéz og Evo Morales, vóru á sjúkrahúsinum og vitjaðu Castro í gjár. Chavéz hevur vitjað Castro fleiri ferðir síðani skurðviðgerðina, og tað var eisini hann, sum fekk vitjanina í gjár í lag, skrivar Gramma. Hinvegin hevur Castro ikki hitt aðrar útlendskar leiðarar, og tí var tað hálvbróðurin Raúl Castro, sum tók ímóti forsetanum í Laos, tá hann kom til Kuba fyrr í vikuni.

Tað hevur leingi ljóðað, at tann 80 ára gamli Fidel Castro hevur krabbamein, men tað hava kubansku myndugleikarnir avsannað. Tað er heldur ikki heilt greitt, hví hann varð lagdur undir skurð í summar, men sagt verður, at hann er lætnaður 18 kilo síðini viðgerðina.



*Castro fekk í gjár vitjan av tveimum forsetum á sjúkrahúsinum*

### Framvegis nógvar landminur

Hóast stór øki eru ruddað fyri landminur, eru tað framvegis fleiri túsund fólk, sum fáa mein ella doyggja av teimum vandafullu minunum.

Nakrir felagsskapir, sum stríðast ímóti landminum, siga í einari nýggjari frágreiðing, at í fjør vórðu 7.300 fólk rakt av landminum, og tað er 11 prosent fleiri enn árið fyri. Umleið 2.000 av teimum 7.300 doyðu av brestunum, og tey flestu vóru sivilfólk. Tær flestu landminurnar brustu í Kolombia, Sri Lanka, Nepal, Burma og teimum palestinsku økjunum.

Felagsskapirnir gera vart við, at tølini umfata bara teir tilburðir, sum eru fráboðaðir, og serfrøðingar halda, at tað veruliga talið er tvær ferðir so stórt.